

# Sakk av menniskjaligum mistaki

**Jan Müller**

01.05.2014 - 09:09

Oljan.fo

Tað var eitt menniskjaligt mistak, sum gjørdi, at pallurin Deepsea Aberdeen sakk stutt fyri nýggjár, efir at hann hevði verið til umvælingar í Suðurkorea.

Í fyrstani gingu søgur um, at tað vóru teknisk brek, sum gjørdu, at tann risastóri pallurin sakk í Suðurkorea, og 900 fólk máttu flytast í land. Men veruleikin er, at pallurin sakk, tí ein lúka, sum skuldi vera afturlatin, stóð opin, sigur Gisle Johanson, sum er talsmaður hjá Odfjell Drilling, við sysle.no.

Eingin fekk skaða av hendingini, tá Deepsea Aberdeen sakk, men sambært norskum fjølmiðlum kann tilburðurin fáa ávirkan á, hvør fær uppgávurnar, tá nýggir oljupallar skulu byggjast í framtíðini.

Deepsea Aberdeen var á veg frá Daewoo-skipasmiðjuni, tá óhappið hendi, og hendingin var stak óheppin fyri Oddfjell Drilling, sum átti pallin.

Í einari frágreiðing, sum ráðgevarafelagið Rystad Energy hevur skrivað, stendur, at norskar skipasmiðjur eru førar fyri at kappast við teirra bíligu asiatisku kappingarneytar, tí tær eru meiri álítandi.